# Meginreglur fyri telefonnýtslu á Skúlatrøð

## Endamál:

- At telefonir ikki órógva undirvísingina
- At telefonir ikki gera, at næmingarnir gerast kropsliga óvirknir í fríkorterunum
- At næmingarnir eru meira saman sosialt í fríkorterunum
- At áseta, í hvønn mun telefonin kann verða eitt amboð í undirvísingini
- At tálma happing á netinum

## Hesar reglur eru galdandi viðvíkjandi telefonnýtslu:

### 1.-7. flokkur:

- Um næmingur hevur telefon við í skúla, skal hon verða beind burtur og ikki órógva í tíma og fríkorteri
- Um næmingur skal nýta telefonina, skal hetta fyrst avtalast við starvsfólk skúlans

### 8.-10. flokkur:

- Um næmingur hevur telefon við í skúla, skal hon verða beind burtur og ikki órógva í tímunum
- Um næmingur skal nýta telefonina í tímunum, skal hetta verða eftir avtalu við starvsfólk skúlans
- Tá ið næmingar eru á øki, har 1. – 7. fl. vanliga heldur til, eru reglurnar fyri 1. - 7. fl. galdandi

### Atgerðir:

- Um reglurnar ikki verða hildnar, verður telefonin tikin og løgd á skrivstovuna, har foreldur/verji skulu heinta hana

Hesar meginreglur eru samtyktar á fundi í skúlastýrinum tann 06.06.17